tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 45 Hósdagur 6. mars 1997 71. árgangur Kr. 7,00

# Karensdagarnir skulu burtur

Javnaðarflokkurin heldur, at tíðin nú er búgvin at taka av lógina um karensdagar. Samstundis skulu tey tímaløntu eisini hava løn frá fyrsta sjúkradegi

Síða 4



*Teir, ið selja fóður, fíggja millum 80 og 100 milliónir krónur í føroysku alivinnuni*

# Fóðurselj-arar fíggja stóran part av ali-vinnuni

Norðmenn hava spælt við opnum kortum. Teir eru ikki komnir gjøgnum bakdyrnar inn í føroysku alivinnuna, sigur føroyskur fóðurlatari

Síða 8

## Janus Norðberg, flakavirkið í Hvalba:

# - Eg orki ikki meira



Janus Norðberg heldur seg ikki til at royna eina ferð afturat at reisa flakavirkið í Hvalba, sum fer undir hamaran um tvær vikur

Síða 5




Fyrireikingarnar, sum nú verða gjørdar í samband við oljuleitingina eiga lut í bjartskygninum, sum valdar í Føroyum í dag, segði løgmaður, tá hann setti oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í gjar

# Oljuvinna elvir til bjartskygni

VØRU-KOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM TIL FØROYA
Goymsla & Flytikassar
TILBOÐ verða givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading TRANSPORT
Tlf. 17272
Fax 15009

Brúktar fløgur
– vit keypa og selja.
Kom og hygg!

Vit senda fløgur kring alt landið – og eisini uttanlands.
TUTL

FLOGFRAKT * SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 12222

*Løgmaður setir oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum:*

# Oljuvinna elvir til bjartskygni

*-Vend er við at koma í búskaparligu gongdina í Føroyum, og meira bjartskygni er at hóma millum føroyingar. Fyrireikingarnar, sum nú verða gjørdar til eina møguliga oljuvinnu eiga sín lut í hesum bjartskygni segði Edmund Joensen, løgmaður, tá hann í gjár setti oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum.*

JAN MULLER

Ikki færri enn 400 fólk eru við á stóru oljuráðstevnuni, sum verður hildin í Norðurlandahusinum í hesum døgum.

Umboð fyri so gott sum allar partar av vinnulivinum, fyri almennar og kommunalar stovnar og myndugleikar, politisku flokkarnar, landsstýrið o.o. høvdu leitað sær í Norðurlandahusið mikumorgunin, tá tiltakið, sum Føroya Oljuidnaður og Amerada Hess bólkurin skipa fyri, fór av bakkastokki. Sjáldan hevur húsið verið so á tremur sum henda morgunin.

**Løgmaður setti stevnu**

Tað var so heldur eingin minni enn Edmund Joensen, løgmaður, sum setti stevnuna. Hann vísti, at føroyski búskapurin hevur verið fyri stórum bakkasti fyrst í 90-unum, men saman við politiskum tiltøkum, er nú vend komin í og eitt bjartskygni er at hóma millum føroyingar.

-Partur av hesum bjartskygni kann vera knýttur at fyrireiking til eina møguliga oljuvinnu í Føroyum, sum hevur verið seinastu árini og so tann stóri áhugin hjá oljufeløgunum fyri tí føroyska økinum.

Løgmaður segði víðari, at føroyska vinnu- og handilslívið (business community) tekur væl ímóti hesi avbjóðing og ynskir at fáa samband við oljuvinnuna longu nú, áðrenn veruligt oljuvirksemi hevur tikið seg upp.

Løgmaður vísti á, at tað enn eru nógvar spurningar, sum skulu svarast, áðrenn nakað ítøkiligt kann sigast um møguleikan at finna olju, men hann helt, at føroyingar verða førir fyri at skipa fyri einum brúkiligum karmi rundan um eina møguliga oljuvinnu.

Hann helt fyri, at ein oljuvinna kann koma at fáa eina sera stóra ávirkan á føroyska samfelagið.

-Latið okkum eygleiða hesi framstig sum tekin um eina nýggja tíð við nýggjum avbjóðingum.

Løgmaður vónaði, at Føroyar og útlendska oljuvinnan kunnu fáa eitt gott samstarv og helt hann, at ein slík ráðstevna kundi vera partur av hesi felags stevnu.

Síðani fekk formaðurin í Føroya Oljuidnað, Pauli Einarsson, orðið. Hann segði seg vera ómetaliga væl nøgdan við tann stóra áhugan fyri ráðstevnuni, sum hann aftur vónaði kundi vera eitt týðandi lið í royndunum at byggja upp eina føroyska oljuvinnu.

**Amerada Hess**

Umboð fyri tey fýra oljufeløgini, sum sponsorera ráðstevnuna, høvdu eisini orðið í sambandi við setanina av stevnuni.

Mike King frá Amerada Hess greiddi stutt frá virkseminum hjá felagnum, sum í Bretlandi hevur meira enn 1000 fólk í arbeiði. Eitt teirra er ein føroyingur, sum júst er settur í fast starv. Tað er Ben Arabo, búskapartrøðingur.

Mike King vísti á, at Amerada Hess er tað felagið, sum hevur flest blokkar á bretskum øki, hvørs royndir teir fara at gera brúk av í føroyskum øki. Eisini vestan fyri Hetland er felagið sera virkið.

Felagið er operatørur fyri fýra feltum á bretskum øki, haraf Scott er tað størsta og einsamalt fevnir um 10% av samlaðu framleiðsluni í Bretlandi.

Amerada Hess er partnari í Schiehallion feltinum, sum goymir ikki minni enn 350 milliónir tunnur av olju, og tað er slíkt felt, sum teir nú leita eftir á føryskum øki.

-Enn er langt á mál, men sum móður mín altíð segði, tá vit skulu fara burtur - at ferðast er eins hugaligt sum tað at koma á mál. Vit síggja fram til at ferðast saman við tykkum føroyingum segði Mike King, sum er kanningarstjóri hjá Amerada Hess í føroyska økinum.

**LASMO**

Mike Welland, kanningarstjóri hjá Lasmo, tók síðani orðið og greiddi frá hesum felagnum, sum er við í Hess-bólkinum.




*Edmund Joensen, løgmaður setur ti fyrstu veruligu oljuráðstevnuna í Føroyum*




*Pauli Einarsson, formaður í Føroya Oljuidnaði, sum skipar fyri stevnuni*

*Eftir uppmøtingini at døma so er áhugin fyri eini møguligari oljuvinnu ómetaligu stórur. Mynd Jens Kr. Wang*



tíðindablaðið
**SOSIALURIN**
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið




*Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.*

- ☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn:

Bústaður:

Postnr., bygd/býur:

Tlf.: Undirskrift:



*Mike King frá Amerada Hess*



*Tey høvdu úr at gera, tá meira enn 400 føroyingar tíðliga mikumorgunin, stóðu í bíðiröð uttan fyri Norðurlandahúsið fyri at vera við á oljuráðstevnuni. Tær fýra føroysku kvinnurnar tóku sær av skrásetingini, meðan skrivarin hjá Lasmo aftast vm. og Johan Mortensen, umboðsmaður hjá Amerada Hess gingu fólki til handa*



*Michael Welland frá LASMO*



*James Efstathiou frá Norsk Hydro*



*Hans Jørgen Rasmussen frá DOPAS*

Hann var ovfarin av tí stóru luttøku til ráðstevnuna.

-Eg siggi fram til nakrar sera áhugaverdar dagar.

Lasmo er eitt bretskt felag, sum varð stovnað fyri 25 árum síðani, og sum í dag arbeiðir í 12 londum, serstakliga í bretskum øki og í Indonesia.

-Alla staðni í heiminum har vit arbeiða halda vit ta einastu leiðina at fáa góð úrslit at hava tætt samstarv (cooperative partnership) við lokala samfelagið og vinnulívið har.

Michael Welland vónaði, at henda ráðstevnan kundi vera ein byggisteinur í hesi gongd í Føroyum - ein byrjan - og at hon kundi skunda undir dialogin og samvinnuna við føroyskt vinnulív.

Lasmo er eisini við í leitingini eftir olju í øðrum oyggjasamfelagum, eitt nú í Falklandsoyggjunum og vil felagið gera alt fyri at gagna hesum samfelagunum.

**Norsk Hydro**

James Efstathiou, kanningarstjóri hjá Norsk Hydro vónaði, at tann leiting, sum skjótt fer í gongd við Føroyar, fer at bera ávøkstur og at olja verður funnin.

Endamálið við hesi ráðstevnuni er at gera føroyingum greitt, hvat slag av virksemi verður í sambandi við hesa leiting og hvussu føroyska vinnulívið og samfelagið sum heild kunnu fáa sín ágóða av hesi gongd.

Hann segði, at fyri at fáa eina góða ráðstevnu, er neyðugt, at føroysku luttakararnir eru virknir og seta spurningar.

Hann greiddi stutt frá um Norsk Hydro, sum er eitt norskt felag, 90 ára gamalt, ið arbeiðir innan fleiri vinnulívsgreinar. Oljupartúrin er bert 25 ára gamal. Norsk Hydro var við í tí fyrsta feltinum, sum var funnið á norskum øki, nevniliga Ekofisk. Í dag er felagið ein av teimum størstu operatørunum á norskum øki. Tað arbeiðir eisini í fleiri øðrum londum.

**DOPAS**

Hans Jørgen Rasmussen, stjóri í Dopas hevði eisini orðið. Hann segði, at teir í Dopas eru errnir av at kunna vera við á ráðstevnuni og vísti á, at Dopas er tað einasta felagið í Hess-bólkinum, sum higartil hevur havt eina operatøruppgávu í føroyskum øki, nevniliga Lopra, og eisini tað var hann errin av.

Hann helt Dopas hevði fingið góðar royndir frá hesum virksemi, ikki minst hvat tað hevur at siga, tá henda nýggja vinna tekur seg upp í einum nýggjum øki.

Hans Jørgen Rasmussen helt ráðstevnuna vera eitt sera gott tiltak. Hann mintist 25 ár aftur í tíðina, tá teir í Dansk Naturgas løgdu fyrstu hond á eina komandi gasvinnu og samanmetti hetta við tann útvikling, sum nú er í gongd í Føroyum.

-Vit gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at fáa ídnaðin í Danmark við upp í arbeiðið og hevur hetta eisini eydnast væl.

Í dag er Dansk Olie og Naturgas ein stór og týðandi fyritøka í donsku oljuvinnuni, sum fegin vil vera við í menningini av eini føroyskari oljuvinnu.

Hann bað føroyingar ikki bera ótta fyri at seta spurningar í sambandi við hesa nýggju vinnu.

-Don't forget, we were all beginners once.

Ráðstevnan í Norðurlandahúsinum heldur fram í dag. Umframt teir mongu føroyingarnar, sum luttaka á ráðstevnuni, er eisini væl av útlendingum komnir henda vegin. Fleiri teirra halda fyrilestrar um leiklutin hjá vinnulívinum í eini leitingarfasu. Har verður so eisini eitt aðalorðaskifti, tá ráðstevnan endar seinnapartin.

**DANNY TRANSPORT**

– tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 19192**



**STILLADS ÚTLEIGAN**

Nærri við at ringja

Pf. **Kaj Andreasen & Co.**

Tlf. 15600

## *Fólk til oljufýrtænastuna í Eysturoynni*

**Til oljufýrtænastuna hjá Statoil í Eysturoynni søkja vit eftir dugnaligum og ágrýtnum folki**

Arbeiðið fevnir um at hava árligt eftirlit við oljufýrunum hjá teimum sum hava Olju fýrtænastuna og at rætta oljufýringsbrek, tá hjálp verður tilkallað.

Arbeitt verður aðruhvørja viku við árliga eftirlitinum, og aðruhvørja viku hevur tú tilkallivakt frá 8.00 – 23.00. Í vikuskiftinum og halgidagar eru vaktirnar frá 10.00-23.00.

Tað er ein fyrimunur, um tú ert elektrikkari ella maskinlærdur.

Skrivlig umsókn saman við ljósprenti av prógvum og viðmælum skulu sendast til Pf. Statoil, postsmoga 3098, 110 Tórshavn. Umsóknin skal verða okkum í hendi skjótast gjørligt, tí starvið skal setast umleið 1. apríl.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Hevur tú spurningar viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at venda tær til Statoil á Viðarnesi og tosa við Hans Waag.

**STATOIL**

*á Viðarnesi, Postsmoga 3098, 110 Tórshavn, tlf. 11133*